## Ronaldinho aftur á toppinum

Brasilski fótbóltsspælarin Ronaldinho, sum verður roknaður sum heimsins besti, hevur ikki gjørt stórvegis um seg seinastu vikurnar. Sunnukvøldið var hann tó aftur í rætta essinum og skoraði bæði málini, tá ið FC Barcelona vann 2-0 á Santander. Barcelona var í trupulleikum tíðliga í dystinum, men Santander brendi brotssparkið, sum teir fingu.

## Claus skal stríðast fyri Chelsea



Týskvøldið spælir enska felagið Blackpool steypadyst ímóti Norwich. Dysturin er í siðvandu FA Cup kappingini, og hetta er ein umdystur. Fyrri dysturin millum Blackpool og Norwich endaði við javnleiki, og í annaðkvøld skal tað gerast av, hvør fer víðari í kappingini. Claus Bech Jørgensen er ein av spælarunum hjá Blackpool, og hann hevur veruliga nakað at stríðast fyri, tí mótstøðuliðið í næsta umfarinum verður meistaraliðið Chelsea.



*VB-kvinnurnar stríddust allar 60 minuttir á tamb, men tá alt kom til, vóru tær upp ímóti yvirveldinum. Snøgt sagt, so var Stjørnan ov sterk mótstøða*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Una Olsen kundi fyri aðru ferð í trý ár fara á pallin eftir steypinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

lastast fyri eitt tað einasta av teimum 31 Stjørnu-málunum. Eitt tal, sum ivaleyst vildi verið væl hægri við einum øðrum málverja.

### Eitt komplett lið

Hóast málmunurin soleiðis ongan tíð gjørdist tann heilt stóri, so sat áskoðarin tó alla tíðina við kensluni av, at hesin sigurin var heima hjá Stjørnuni. Kanska hevði VB ein evarska lítlan møguleika at gera um seg, tá Stjørnan ta einu løtuna spældi við tveimum í undirtali, men tað var at kalla tað.

Snøgt sagt, so telur liðið úr Klaksvík ov nógvar royndar spælarar, sum ikki høvdu nakra sum helst ætlan um at forera VB nakað sum helst. Í Alinu Olaru hava tær kanska mest kompletta spælaran í kvinnudeildini, og eisini hinar báðar útlendsku – Simona og Agnes – teljast millum avgjørt sterkastu kortini í landinum. Legg hartil landsliðsroyndirnar hjá Unu, Joan, Onnu Kristinu og Báru, umframt evnaríku Louisu, Mariu og Duritu, og so er greitt, at fá lið í landinum hava møguleikan at standa Stjørnuni kurl.

Tað gjørdi VB so heldur ikki, men tær áttu kortini sín stóran heiður fyri royndina, har tær fram til tað allar seinasta spældu fyri sínum møguleika.

## FAKTA

**Stjørnan-VB 31-28 (16-11)**
Støður í dystinum
**10 min:** 5-3
**20 min:** 8-8
**40 min:** 22-15
**50 min:** 26-51
**Málskjúttar:**
**Stjørnan:** Alina Olaru 8, Simona Petersen 8(1), Joan M. Djordjevic 7, Durita Christophersen 4, Una Olsen 2, Anna Kristina Samson 1, Maria við Neyst 1
**VB:** Daiva Toumaite 9(3), Gurið Mortensen 5(1), Svava Vestgergaard 4, Rannvá Johannesen 3, Laila Jespersen 3, Una Egilsdóttir 3, Ivana Ljubicic 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3/1, VB 6/4
**Útvísingar:** Stjørnan 5, VB 4
**Diskvalifikatión:** Stjørnan 1 (3X2 minuttir)
**0** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

## Spældu fyri møguleikanum

Gurið Mortensen var komin heim úr Danmark at spæla steypafinalu við VB. Gurið var eisini ein av mest eyðsýndu leikarunum á VB-liðnum í steypafinaludystinum ímóti Stjørnuni, og hon var sum vera man skuffað yvir tapið.

- Eg eri ótrúliga skuffað. Tær tykjast at vera meir klárar enn vit til dystin í dag, og tá gerst tað tungt. Vit eru væl við fyrsta løtuna av dystinum, men vit brenna tvey brotskøst og fáa onkra býtta útvísing, og hetta kostar ov nógv. Við hesum fáa tær møguleikan at leggja seg á odda, og undan steðginum blívur munurin heili fimm mál, so tá sá ikki so gott út.

Gurið helt tó eftir dystin, at VB veruliga royndi at koma aftur í seinna hálvleiki, men at tær tó gjørdust ov stuttar.

- Tá vit koma út til seinna hálvleik, er mótbrekkan brøtt. Vit eru aftanfyri við fleiri málum, men eg haldi, at vit blíva við at kempa. Vit trúgva alla tíðina uppá okkara møguleika, men vit gjørdust tó ov stuttar. Vit koma ongantíð nærri enn fýra mál, áðrenn tær svara aftur, so tá er ikki lætt hjá okkum, staðfesti ein skuffað Gurið Mortensen eftir dystin.

**-teitur**